# Nigeriani kannar góðskuna á Høvdavirkinum

**Faroe Marine Products hevur ein nigeriana, Michael Abraham Okechukwu, á arbeiðsplássinum, sum skal syrgja fyri, at góðskan á vøruni er nóg góð. Familjan hjá honum er eftir í Nigeria, og hann saknar tey sera nógv. – Eg kenni meg sum ein part av familjuni Húsamørk, sigur Michael, sum gongur í kirkju hvønn sunnudag**

GÓÐSKUMETAN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*




Faroe Marine Products (FMP) í Leirvík, sum av summum er betri kent sum Høvdavirkið, arbeiðir við at turka høvd, sum verða seld til Afrika. Meginparturin av útflutninginum fer til Nigeria, har ið turkað fiskahøvd er ein sannur leskibiti. Høvdini verða ofta nýtt til suppu.

Michael Abraham Okechukwu er nigeriani, og hann arbeiðir í pakkingini á Faroe Marine Products í Leirvík. Hann býr hjá Hugo á Húsamørk í Leirvík. Hugo er ein av leiðarunum á Høvdavirkinum. Michael er sendur til Føroya av einum keypara hjá FMP í Nigeria. Høvdavirkið selur fyrst og fremst til Nigeria, og tí er tað í besta áhuga hjá øllum, at Michael er í Føroyum og góðskumetir vøruna.

– Eg arbeiði fyri ein stóran keypara í Nigeria, sum vit kalla fyri Chief Jombo. Hann klagaði um góðskuna á høvdunum, sum vit fingu frá FMP, og tí sendi hann meg til Føroya at góðskumeta vøruna. Eg fái løn frá FMP, og eg skal vera her, inntil Chief Jombo kallar meg heimaftur. Eg veit ikki, nær tað verður, sigur Michael.

### Í Nigeria eru fólk rík ella fátøk

Michael er vaksin upp í Anembra State. Hann fekk ein góðan uppvøkstur, og hann hevur útbúgving. Men tað eru ikki øll, sum eru so heppin sum hann

– Tað kann vera nokkso hart hjá nógvum. Tað búgva 130 milliónir fólk í landinum, og nógv av teimum eru sera fátøk. Men tað eru eisini nógv sera rík fólk í landinum. Munurin er so avbera stórur. Eg eri kanska í miðalklassanum, men miðalklassin er ikki eins stórur og í vesturheiminum. Í Nigeria ert tú antin ríkur ella fátækur. Politikarnir eru vánaligir. Teir klára og vilja ikki at broyta uppá tað sosiala órættvísi, sum er í Nigeria, sigur Michael.

### Familjan eftir í Nigeria

Honum dámar væl í Føroyum, men tað er torført at vera burtur frá familjuni.

– Eg ofri nógv við at vera her. Eg havi konu og tvey børn eftir í Nigeria. Eg sakni tey so nógv! Eg ringi 2-3 ferðir um vikuna til Nigeria og tosi við tey. Tað er dýrt, men annars hevði eg ikki hildið tað út.

– Strangi innflytarapolitikkurin forðar mær í at taka familjuna við til Føroya, sigur Michael.

### Álitismaður

– Lønin í Føroyum er góð, men skatturin er eisini sera høgur. Men pengarnir koma væl við hjá familjuni, sigur Michael.

Michael er ein av næstu monnum hjá Chief Jombo, og hann hevur sera gott álit á Michael.

– Chief Jombo lítur á meg. Eg havi arbeitt leingi hjá honum, og eg eri vorðin álitismaður. Starvið, sum eg havi í Nigeria, er gott. Eg eri útbúgvin innan "Public Relation", og ikki eri eg ikki so illa fyri, sigur Michael.

### Gongur í kirkju

Michael arbeiðir 40 tímar um vikuna. Hann hevur ikki nakað ávíst frítíðarítriv.

– Saknurin ger, at eg ikki fái uppí lag at gera nakað aftaná arbeiðstíð. Eg hjálpi til í húsinum hjá Hugo, og so plagi eg at fara í kirkju sunnudag. Eg eri vaksin upp í einum katólskum umhvørvi, og lutherska kirkjan í Føroyum líkist nógv tí katólsku í stíli. Tíverri skilji eg ikki nakað av tí, sum verður sagt. Men eg ætli mær at ganga til kvøldskúla, so at eg kann læra føroyskt. Eg havi eisini hugsað um at fara í Missiónshúsið í Leirvík onkuntíð, sigur dámligi nigerianin.

Hann er takksamur fyri tann blíðskap, sum hann hevur fingið frá arbeiðsfeløgunum. Eisini verður hann væl viðfarin av Hugo á Húsamørk, sum gevur honum tak yvir høvdið.

– Hugo og hansara familja hava tikið sera væl ímóti mær. Eg kenni meg sum ein part av familjuni. Hugo er ein góður vinur at hava, sigur Michael.

Michael væntar, at hann fer til Nigeria at vitja um eitt ár. Síðani kemur hann aftur og arbeiðir her so leingi, sum Chief Jombo vil hava hann her.

# Høvdavirkið fimm ár

**Í dag eru tað fimm ár síðani Høvdavirkið Faroe Marine Products (FMP) byrjaði framleiðsluna av turkaðum høvdum. Í tí sambandi hevur leiðslan bjóða øllum fiskavirkjum og øllum kundum at koma á vitjan á virkinum. Eirikur á Húsamørk er stjóri á FMP, og hann greiðir Sosialinum frá, hvussu tað hevur verið at byrja eina fyritøku frá grundini og arbeitt hana upp til tað, sum hon er í dag**

HÁTÍÐARHALD
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



– Vit hava allatíðina havt sera gott samband við íslendingar, sum hava turkað fiskahøvd í nógv ár. Teir eiga 45 % í virkinum, meðan familjan hjá okkum eigur 45%. Samstarvið við teir hjálpti okkum at fáa eina góða byrjan. Teir komu við vitanini, og tí sloppu vit undan at gera teir vanligu byrjunar-brølararnar. Longu í okkara fyrsta framleiðsluárið koyrdi tað, sum tað skuldi, sigur Eirikur á Húsamørk

Við árunum hava teir á FMP sjálvir ment framleiðslumannagongdir og turkimátar, sum íslendingar eisini hava tikið til sín. Soleiðis hava báðir partar notið gott av samstarvinum.

### Bíliga orkan er ein fortreyt

FMP fær bíliga orku frá brennistøðini í Leirvík, og uttan tað hevði virkið ikki borið seg.

– Tað krevur nógva orku at turka høvd. Í Íslandi er orkan sera bílig, og vit hava so samrátt okkum til ein kappingarføran prís frá IRF. Tað hevði ikki borið til at havt slíka framleiðslu annars, sigur Eirikur.

Meginparturin av framleiðsluni hjá FMP verður útflutt til Nigeria, har ið høvdini verða nýtt til krydd. Í Afrika er tann ræsti smakkurin ein leskibiti, men tey fáa ikki framleitt hann í Afrika. Ein vanligur nigeriani má gjalda eina heila dagsløn fyri at fáa eitt fiskahøvd, so tað sigur eitt sindur um, hvussu væl dámd tey eru har.

### Ársins virki í 2005

Høvdavirkið varð valt til ársins virki í 2005. Hetta er nakað, sum tey eru sera errin av í Leirvík.

– Vit eru errin av, at vit uppá so stutta tíð hava fingið so góð úrslit. At vit vórðu vald til ársins virki í fjør var enn eitt herðaklapp. Men eg má eisini rósa fólkunum, sum valdi ársins virki, fyri at tey tordu at taka eitt somikið øðrvísi val. Tað kann tykjast eitt sindur umvent, at ársins virki brúkar slógv í framleiðsluni og útflytir matvøru til menningarlond. Soleiðis kunnu vit síggja, at tað er nógv broytt tey síðstu árini, sigur Eirikur.

Hann metir, at tann sannroynd, at FMP brúkar spillvøru til teirra framleiðslu eisini kann hava havt ávirkan á avgerðina. Teir fáa nógv burturúr fiskahøvdum, sum annars høvdu verið blakað burtur.

– Vit hava altíð havt eitt sera gott samstarv við fiskavirkini, sum vit keypa høvdini frá.

### Framleiða djórafóðri í framtíðini

Leiðslan í FMP ætlar ikki at liggja á løtu síðuni, hóast tað hevur gingið væl. Teir arbeiða við nógvum ætlanum um at víðka um virksemi.

– Vit sóu eitt gott høvi at fáa grót, tá ið undirsjóvartunnilin varð gjørdur. Vit hava planerað eitt øki á 1200 fermetrar, sum kann nýtast til framtíðarvirksemi.

Eirikur á Húsamørk vil ikki koma nærri inn á hvørjar ítøkiligar ætlanir teir hava.

– Tað má tíðin vísa, sigur hann.

Tó sigur hann, at teir arbeiða sera miðvíst við at framleiða djórafóðri úr pelagiskum fiski.

– Vit vóna, at tað kann gerast enn eitt bein hjá okkum at standa á. Afrikanski marknaðurin kann vera óálítandi, sop tað er stórur vági við einans at stasa uppá hann. Tí hevði fyritøkan verið tryggari, um vit eisini framleiddu eina vøru til keyparar í ídnaðarlondunum.